## Harður kappingarneyti

Meðan danska stórreiðaríið A.P. Møller-Mærsk gremur seg um keðiliga gongd á bingjumarknaðinum, sigur Singapore-reiðaríið Neptune Orient Lines, at tað væntar vøkstur í sínum bingjuflutningi til USA og á øðrum leiðum í ár. Samstundis hevur reiðaríið kunngjørt roknskapin fyri 2007, sum vísir, at umsetningurin vaks heili 12 prosent og kom upp á 8,2 mia. dollarar. Nettoavlopið vaks 53 prosent og var 523 mió. dollarar, sigur TV2.



*A.P. Møller-bingjuskipini fáa harða kapping úr Singapore (Mynd: A.P. Møller-Mærsk)*

# Stórar broytingar í russisku fiskivinnnuni standa fyri framan

**Tey seinastu mongu árini hevur fiskivinnan í Russlandi verið í svárari kreppu. Lítil og eingin fíggjarligur stuðul frá statinum, flotin hevur nærum ikki verið dagførdur síðani síðst í áttatiárunum, flest skip eru vorðin gomul og ótíðarhóskandi. Savnaða russiska ársveiðan er tey seinastu tjúgu árini minkað við umleið 70%**

BROYTINGARTÍÐ
*Ivan Eginsson Moskalenko*

Tann nýggi og sera virkisfúsi ovastin innan fiskivinnu, fyrrverandi tíðindamaður og havnameistari í Kaliningrad Andrej Krajnij, er komin við nógvum broytingum á økinum.

Frá 1.januar 2009 fáa russisku reiðaríini nýggjar kvotur, ið verða galdandi í tíggju ár. Núverandi kvotur eru bert galdandi í fimm ár. Henda tíðarleingjan av fiskiveiðurættindum fer ætlandi at hjálpa einstøkum feløgum at útvega bankafígging til keyps av nýggjari skipum uttanlands og nýbygningar. Ein russiskur statsbanki, Rosselhozbank, hevur longu játtað russisku fiskivinnuni 50 milliardir rublar (á leið 10 milliardir danskar krónur) fyri 2008. Henda risaupphæddin verður fyrst av øllum nýtt til dag føringar av sjálva fiskiflotanum, men eisini fiskavøruframleiðslu á landi.

Ein onnur merkisverd broyting verður tann, at allur fiskur, ið er fingin umborð í russiskum sjógvi, má eisini landast í russiskum havnum. Tann stirvna og skrivstovuveldiskenda skipanin í dag noyddir russisk skip at landa í Norðurnoregi og Suðurkorea. Sambært Andrej Krajnij, verða hesi viðurskiftini fingin í rættlag longu í ár, so tað verður ásett við lóg at øll skipini, sum fiska í russiskum sjógvi, koma við matvøru beinleiðis á sín heimamarknað – og ikki ígjøgnum norskar ella koreanskar formidlarar. Hetta verður tó bert galdandi fyri skip undir russiskum flaggi.

Tað kemur eisini ein nýggj lóg, sum ásetur, at bert feløg við russiskum kapitali sleppa at varðveita síni kvoturættindi í russiskum sjógvi. Reiðaríini við útlendskum pengum, serliga í Fjareystri, har nógv feløg hava verið uppkeypt av íleggjarum úr Japan, Korea og Hong Kong, fáa ikki varðveitt sínar núverandi kvotur. Hinvegin verða útlendskir íleggjarar vælkomnir at samstarva innan fiskavirki og fiskavøruframleiðslu.

### Ávirkar ei Føroyar

Sæð við føroyskum eygum, ávirka hesar broytingarnar neyvan viðurskifti landanna millum á fiskivinnuøkinum nakað serligt í fyrstu atløgu. Í øllum førum kemur tað ikki beinanvegin uppá tal at gevast við meira enn 30 ára gamla kvotusamstarvinum. Tað vil siga, at føroyingar framhaldandi sleppa at veiða toskí Barentshavinum, meðan russar fara at halda fram við svartkjafta- og sildaveiðu undir Føroyum.



*Andrej Krajnij*

Kortini fer henda støðan møguliga at broytast, tá ið Russland hevur nóg mikið av egnaðum skipum, ið megna at fiska hvítfisk í sínum egna sjógvi.

Undir Sovjetsamveldinum vóru nógvir frystitrolarar úr Murmansk, Vladivostok umráðnum og Kamtjatka hálvoynni í altjóða sjógvi. Nú eru teir fyri stóran part at finna í russiskum sjógvi, serliga í Beringshavinum og Ohotska havinum í russiska Fjareystri, har 70% av landsins fiskiflota hoyrir til. Á okkara leiðum fiska hesir trolararnir fyri tað mesta í norska, føroyska, íslendska og grønlendska sjógvi í Norðuratlantinum, eins og í marokkanska sjógvi í Norðurafrika. Viðvíkjandi stórum pelagiskum trolarum er ætlanin hjá fiskivinnuovastanum at satsa meira uppá tey uttanveltaðu fiskaumráðini, ikki minst Kyrrihavið – soleiðis at russar ikki fara at missa síni søguligu rættindi, sum teir høvdu har í soviettíðini, tá ið landið fiskaði upp til 11.000.000 tons av øllum fiskasløgum árliga – ímóti bert 3.200.000 tonsum í 2007.

Tað savnaða marknaðarvirðið av árligu russisku fiskiveiðuni er mett til at vera meira umleið 25 milliardir danskar krónur.



*Trolarin Omar við bryggju í Kaliningrads havn*